# KT-vørður
## til Sjónvarp Føroya

Eitt starv sum KT-vørður er leyst at søkja í Sjónvarpi Føroya.

Arbeiðið umfatar umsiting av servarunum hjá SVF, backup og support av brúkarum. Umframt tað eru eisini ymiskar aðrar ad-hoc uppgávur, sum javnan stinga seg upp í einum livandi umhvørvi.

**Førleikakrøv:**
Viðkomandi útbúgving ella arbeiðsroynd-ir. Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur arbeitt við netloysnum, og at umsøkjarin hevur hegni til skjótt at seta seg inn í nýggj forrit og nýggjar skipanir. Neyðugt er, at umsøkjarin er fyrikomandi og hevur lætt við at starvast saman við nógvum ymiskum fólkum.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sjónvarp Føroya, telefon 340400 og spyrja eftir Jónheðin Tróndheim.

Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir við CV, prógvum og viðmælum verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 25. januar, 2002.

team85

**Sjónvarp Føroya**

*Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi, umframt handilsligum virksemi.*

# Pedagogar
## til Dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna undir Hamri verður søkt eftir 1 pedagogi 35 t. viku og 1 pedagogi 40 t. viku, at byrja 1. mars 2002. Størvini eru á stovu við 12 børnum 0-3 ár.

Til stovuna í Króki verður søkt eftir 1 pedagogi 40 t. viku at byrja 1. mars 2002. Starvið er á stovu við 12 børnum 0-3 ár.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag/Fíggjarmálastýrið og kommunurnar.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran í dagstovninum tlf. 225222.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1. februar 2002 kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, tann 14. januar 2002

**Fuglafjarðar býráð**

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Honda Civic 1,5 I VTEC – 5 hurðar
**Árg.:** 1996
**KM.:** 105.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast hjá tryggingini á Smyrilsvegi, 100 Tórshavn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Beinleiðis tlf. 345727
Fax. nr. 345607
e-mail: fm@trygging.fo
Fróði Müller
at hitta mánadag til hósdag millum kl. 08.30 til 10.00 og fríggjadag millum kl. 08.30 til 16.00.


**ALTERNATIVUR HEILSUBATI**

*Við natural therapy & medisini*

UM TÚ LÍÐUR AV:

# Kropp- ella vøddapínu

# Astma & Allergi

# Gikt & øðrum liðasjúkum

# Sodningartrupulleikum

# Forkølilsi, influensa, lungnabruna

KUNNU EISINI:

# Styrkja immunverjuna

# Javnviga nervarnar á fólki við depressión, insomnia, nervosa

OG MANGT ANNAÐ

*Ring til Olgu á tlf 44 86 59/22 42 58*


# Skúrur til sølu

Skúrur, uml. 2,80 x 5,00 m, til sølu fyri hægsta, hóskandi boð.

Skúrurin er av Tekniska Skúla sniðnum, bygdur síðst í 80-árunum.

Verður seldur í tí standi, hann er í nú. Kontant gjald.

Skúrurin kann sýnast á Gróðurstøðini, Hvítanesvegi 3, Hoyvík.

Skrivlig boð skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 22. januar 2002.

**Skógrøkt landsins**
Hvítanesvegur 3, Hoyvík
Postrúm 1174
110 Tórshavn
telefon 310922, telefaks 310944,
teldupostur: skogrokt@skogrokt.vms.fo

# Deildarleiðarastarv á Menningarstovuni

Til tess at styrkja virksemið og ráðgevingina í útflutningsviðurskiftum á Menningarstovuni (Faroe Islands Trade Council) verður deildarleiðarastarv við hesum lýst leyst at seta 1. februar 2002 ella skjótast gjørligt.

Stovan arbeiðir við at umskipa sítt virksemi innan útflutningsøkið burtur frá higartil kendu framsýningarluttøku til uppsøkjandi tørvs- og marknaðarkanningar, upplýsing um marknaðarmøguleikar og føroyska vinnu, skeiðsvirksemi og kunningarferðir v.m.

Hon/hann, ið sett/ur verður, skal taka sær av hesari umskipan og fremja hana í verki.

**Førleikakrøv:**
Vit hugsa okkum, at hon/hann, ið sett/ur verður, hevur ástøðiligan, akademiskan førleika í altjóða handli ella líka útflutningskenda útbúgving, vinnuligar royndir og hevur í verki sýnt kreativ avrik á hesum øki.
Tað er ein fyrimunur, at tann setti hevur innlit og kunnleika um traditionella føroyska vinnu, men við vinnupolitiska setninginum um nýggjar vinnur verður størri dentur lagdur á førleika/kunnleika til altjóða marknaðin av hesum vinnum.

**Setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanarviðurskifti verða sbrt. avtalu millum avvarðandi fakfelag og Fíggjarmálastýrið ella avtalu, ið kann góðkennast av Fíggjarmálastýrinum.

Umsóknir um starvið verða at senda Menningarstovuni, att.: Kjartan Kristiansen, stjóra, í seinasta lagi 27. januar 2002. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kjartan Kristiansen.

**Menningarstovan**
Faroe Islands Trade Council
Bryggjubakki 12
Postrúm 259
FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 31 30 28
Fax +298 31 04 59
e-mail: kjkr@trade.fo

Lóg og reglugerð fyri Menningarstovuna áseta, at Menningarstovan skal stuðla menningini av føroyskum ídnaði, handverki og tænastuvirksemi við ráðgeving innan tøkni, búskap, leiðslu og útflutning og fyriskipan og luttøku í vinnufremjandi átøkum innan nevndu øki. Við at byggja brýr millum politiska viljan og vinnuna um vinnumenning eigur virksemið serliga at vera málrættað ímóti

– átøkum, sum menna útflutningsførleikan hjá føroyskum fyritøkum
– skipaðari menning av ávísum vinnugreinum og nýggjum vinnugreinum
– at seta ávís menningarøki í brennidepilin
– menning av vinnuligum undirstøðukervi






# Siri søkir kvinnu



Vaksin og álítandi kvinna við lívsroyndum søkist til handil okkara í miðbýnum í Havn.

Ert tú fryntlig og fyrikomandi, dámar tær at arbeiða sjálvstøðugt og at hava við fólk at gera, so ert tú kanska tann heilt rætta til eitt spennandi starv.

Títt ábyrgdarøki verður millum annað undirklæði, bróstprotesur og bandagur, sum skulu lagast til tørvin hjá tí einstaka. Tín uppgáva verður at finna ta røttu loysnina.

Lønin verður eftir avtalu, har tínar royndir telja við. Tú kanst byrja skjótast gjørligt, men ert tú tann rætta, bíða vit fegin eftir tær.

Umsókn kann latast til:

*Tú kanst eisini ringja til okkara á telefon 316610, um tú vilt hava meira at vita, ella støkka inn á gólvið til eitt óbindandi prát.*

**Siri**
**Heilsu og sjúkrarøkt**
**Dr. Jakobsens gøta 18**




www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

**Fiskimálastýrið**
*Aðalskrivstovan*

# Skeiðlærari til Trygdarmiðstøðina fyri sjófólk

Vegnað tað, at ein av okkara lærarum fer í annað starv, søkir Trygdarmiðstøðin í Klaksvík hervið eftir einum fólki, sum kann undirvísa í trygd á sjónum. Starvið er leyst til setan skjótast gjørligt.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- undirvísa í trygd á sjónum, sum umfatar bæði ástøðiliga frálæru og venjingar í at nýta bjargingar- og eldsløkkiútgerð v.m.
- vera við til at menna og gera frálærutilfar í samsvar við altjóða krøv og tørvin hjá vinnuni
- vera við til vanligt viðlíkahaldsarbeiði á venjingarstøðini.

**Førleikakrøv:**
- Tað verður sett sum krav, at umsøkjari skal hava hægstu nautisku útbúgving
- starvsroyndir frá sjóvinnuni ella frá frálandavinnuni.
- Fyrimunur er, um viðkomandi hevur royndir í at undirvísa og fyriskipa trygdarvenjing umborð á skipi.

Viðkomandi, sum settur verður, skal kunna taka ymisk endurútbúgvingarskeið, sum eru viðkomandi fyri starvið.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið er Fiskimálastýrið, og stovnar/deildir undir tí, umframt onnur aðalstýri og løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Trygdarmiðstøðin.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í virkisøkinum og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálstýrinum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Sjóvinnufyrisitingini í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. januar 2002 kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálastýrið, att: Sjóvinnufyrisitingin, Postsmoga 347, 110 Tórshavn**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Trygdarmiðstøðina á tlf. 455882, og tosa við Marius Magnusson, leiðara, ella til Sjóvinnufyrisitingina á tlf. 353030 og tosa við Eyðun Berth Jacobsen, deildarstjóra.

*Trygdarmiðstøðin fyri sjófólk, sum heldur til í Klaksvík, er skipað sum ein deild undir Fiskimálastýrinum, Sjóvinnufyrisitingini. Á Trygdarmiðstøðin undirvísa 2 lærarir burturav. Umframt hesar er ein leiðari, sum partvís tekur sær av frálæruni. Árliga eru tað umleið 600 næmingar, sum taka trygdarskeið. Tann verkaligi parturin, sum umfatar bátavenjingar og grundleggjandi eldsløkkivenjingar fara fram á støðini við Borðoyavík. Tann ástøðiligi parturin ferð fram í hølunum hjá Trygdarmiðstøðini í Bøgøtu 38. Umframt trygdarskeið, ið verður fyriskipað sambært ásetingunum í altjóða sáttmálanum STCW, veitir Trygdarmiðstøðin eisini bátaførara og FRC - skeið í samarbeiði við Nutec í Noregi. Trygdarmiðstøðin hevur eisini samarbeiði við hini norðanlondini um trygdarskeið og er limur í altjóða felafskapinum IASST.*




# Gráur posi frá IRF

Frá mánadegnum 14. til leygardagin 19. januar 2002 fær hvørt húski í limakommununum eina rullu við 26 gráum posum frá IRF.

Gráu posarnir eru ætlaðir til dagliga ruskið, sum skal brennast.

Ein gráur posi verður heintaður frá hvørjum vanligum húski um vikuna.

Víst verður annars til kunningarsíðurnar fyri mars og apríl í IRF-kalendaranum 2002.

IRF